DAGSINS MEINING

ABC

Valstríðið er byrjað av álvara. Sjónvarpið setti hol á mánakvøldið við kjaki millum formenninar í stóru flokkunum. Gjáramorgunin legði Javnaðarflokkurin fram sína valskrá. Tjóðveldisflokkurin hevði landsfund í vikuskiftinum, har hann setti út í kortið. Og soleiðis fer tað nú at ganga slag í slag komandi seks vikurnar.

Uttan iva hevur stórur partur av Føroya fólki fylgt við fyrstu veruliga formansduellini í sjónvarpinum mánakvøldið. Tá varð sett út í kortið, markini vóru strikað upp. Hvørjum tonkum sat so hyggjarin við aftaná hesa sending!

Uttan mun til hvørjum politiskum leiri man er í ber helst til at siga, at vit á skiggjanum sóu og hoyrdu tveir ymiskar partar. Í øðrum vóru Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin. Í hinum Tjóðveldisflokkurin. Tað gekk greitt fram, hetta prógvaði kemiin eisini, at teir tríggir flokkarnir ABC høvdu meira í felag enn E. Tí er mest sannlíka samgongan eftir henda valdystin ABC. Tjóðveldisflokkurin tykist hava valt sama leiklutin sum hann hevur gjørt tað leingi, nevniliga at isolera seg ella bert síggja heilt avmarkaðar samstarvsmøguleikar. Hóast nógv uppá hjarta og siðiliga og vælmeinandi framførslu so tykist formaður Tjóðveldisfloksins ikki at megna at fáa bygt brýr til aðrar síður. Heldur belærandi upptraðkanin skapar ikki júst vælvild og áhuga hjá hinum flokkunum fyri samstarvi.

Man hevði annars roknað við, at landsins størsti flokkur, nú hann hevur verið við til at samtykkja sjálvsstýrissamtyktina á tingi, fór at brúka meiri orku uppá vinstra-høgra politikkin, men so sýnist ikki at vera. At flokkurin kendi seg tvingaðan til at slaka í fullveldispolitikkinum í samgongu, tykist nú at verða nakað, sum Tjóðveldisflokkurin irðir seg um. Tí nú verður aftur tosað um fullveldi innan fá ár, og aftur verður oljan brúkt í valstríðnum, hóast tað enn eingin olja er. Tað er ein sannroynd, at enn veit eingin , um fundið hjá Hess er lønandi. Tí er tað meira ynskipolitikkur enn realpolitikkur, tá oljan framhaldandi skal vera tað, ið heldur lív í fullveldinum.

Illa er telvað av Tjóðveldisflokkinum nú hann heldur fram við at júka um fullveldi – um húsið, sum er liðugt bygt og har tað nú skal innrættast osfr. Flokkurin stendur til framgongd, men tá hugsað verður um, at formaður Tjóðveldisfloksins ferð eftir ferð hevur tosað um eina fólkarørslu heldur enn flokspolitikk – og vit staðfesta, at undirtøkan fyri fullveldisgongdini hevur verið í stórari afturgongd – so er hetta í veruleikanum eisini ein afturgongd fyri Tjóðveldisflokkin.

At veljarin og eftir øllum at døma tríggir av teimum stóru flokkunum nú peika á eina breiða samgongu er heldur ikki so løgið. Føroyar hava brúk fyri eini breiðari samgongu. Tað høvdu Føroyar eisini eftir seinasta val, men tað vildu ávísir flokkar ikki.

Tað kann vera, at B og C fáa meiriluta einsamallir. Tað kann vera at C og E fáa meiriluta einsamallir. Men hyggja vit eftir, hvat landið hevur brúk fyri, so er tað einum tryggum og breiðum parlamentariskum grundarlag – soleiðis at eitt komandi landsstýri fær rikið ein politikk, sum gongur tvørtur um miðjuna. Polariseringin tænir ongum endamáli og eigur als ikki at verða partur av valstríðnum. Tí spurningurin er ikki um antin ella, soleiðis sum løgmaður eisini ger vart við í dag, Spurningurin er um bæði og – at fáa sum mest skilagott burtur úr og at menna vælferðarsamfelagið Føroyar. Harí liggur eisini at nútímansgera viðurskiftini í rikinum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Samferðsla í Eysturoynni

Hallbjørg Hansen
Valevni Tjóðveldisfloksins

Í Eysturoynni hava vit eitt sera fjølbroytt vinnulív. Vit hava tey "vanligu" fiskavirkini, ið hvørt á sínum øki hava serframleiðslur, fóðurvirki til alivinnu bæði til heimamarknað og útflutning, fleiri laksagóðskingarvirkir, turkingarvirki til fiskahøvd v.m. Haraftrat eru nógvar tænastuvinnur at finna kring alla oynna, umframt oljuútgerðarhavn í Runavík. Samanumtikið hevur Eysturoyggin helst tann stórsta útflutningin í landinum í mun til fólkatalið. Alt hetta kunnu vit gleðast um, men vit noyðast samstundis eisini at hugsa um, at hetta krevur nógv av tí almenna. Tað hevur stóran týdning at kunna veita skjótar og góðar tænastur á øllum økjum. Vit eiga at standa saman og gera vart við okkara tørv, her hugsi eg serliga um samferðslumøguleikar. Tað er eitt ógvuliga stórt trýst á veganetið, nú alt meiri av okkara útflutningi fer um Tórshavnar havn. Tá Norðoyggjar verða bundnar saman við Eysturoynni verður hendan stóra ferðslan til høvuðstaðin at vaksa enn meira, ið viðførir enn størri trýst á ferðsluna gjøgnum nógvar av okkara bygdum. Her er tí neyðugt at fáa gjørt nakað munandi áðrenn hetta sambandið verður veruligt.

Tað tykist mær ikki serliga skilagott, at samtykkja eina lóg um Undirsjóvartunnil um Leirvíksfjørð, áðrenn vit vita, hvar hendan leiðin kemur upp Eysturoyarmegin - ella kanska als ikki vita hvussu leiðin skal vera. Løgtingið skyldar kommunustýrinum og harvið íbúgvunum í Leirvík, at koma við einum greiðum svarið uppá hvat ætlanin er. Eg kann ikki ímynda mær, at verandi samgonga kann lata vera við at lurta eftir teimum ynskjum, ið koma frá kommununum, tey hava biðið um ummæli frá. Uttan mun til hvør henda avgerð verður, er eisini altavgerandi, at tað verður gjørt eitt berghol frá Kambsdali til Millum Fjarða, tá undirsjóvartunnilin er boraður ígjøgnum. Hetta kemur at stytta farðleiðina eystur-vestur munandi, og verður ikki bert til stórt gagn fyri útflutningsvinnuna, men eisini fyri ferðsluna til og frá verandi miðnámsskúlunum í oynni v.m.

Vit mugu tó vera varin við, hvussu nógv vit seta í gongd ísenn, nú samfelagshjólini mala nóg so skjótt.

Mugu lætta tilveruna hjá gomlum og brekaðum

Gurli Restorf

At påstå, at gamle mennesker på Færøerne er elsket, er nok at tage munden for fuld.

De gamle er for dyre i drift, siges der.

Men det er trods alt forskelligt, der kan gøres for at lette tilværelsen lidt for de gamle og handicappede, som jo også findes blandt yngre mennesker.

Der kommer jo ofte en del skavanker med årene, som kræver lægehjælp og ofte laboratorieprøver ret regelmæssigt.

Der er jo også mange yngre, som har handicap. Men fælles for de fleste gamle og handicappede er, at turen til ambulatoriet til blodprøver, EKG osv. kan være noget af en prøvelse, når benene ikke rigtig vil makke ret.

Mange, måske de fleste, har de vel sådan, at de skal ned ad en trappe, for at komme ud til taxaen. Det skal dog lige bemærkes, at Færøerne nok har verdens flinkeste og mest hjælpsomme taxachauffører, og tak for det.

Men som sagt, først besværet med at komme af sted, og så ventetiden på ambulatoriet. Der er næsten altid mange mennesker, og et par timer kan sagtens gå, før patienten kan komme hjem igen. Den tid føles lang for folk, som ikke hard et alt for godt.

Uden, at det vil ødelægge landets økonomi, måtte man kunne gøre noget for at lette tilværelsen for de gamle og trætte og ellers handicappede mennesker. Der måtte kunne laves en ambulant tjeneste, så laboranterne kunne komme hjem til patienterne og lette dem tilværelsen på den måde. Hvor ofte der er behov for hjemmebesøg vil hospitalet eller patientens læge kunne tilrettelægge.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Arvurin frá loysingarsamgonguni:

Vanrøkt land

Bergur P. Dam
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi

Samfelagsútbyggingarnar eru koyrdar í mølposa, meðan samgongan hevur savnað saman pening til loysingina. Hetta er ábyrgdarloysi við lít.

Samgonguniðurlagið um greiða og ábyrgdarfulla búskaparpolitikkin er ikki annað enn orð, sum skulu káva útyvir, at eisini á hesum øki hevur samgongan fyrst og fremst runnið undan ábyrgd. Meðan tey fortelja okkum, at tey við størstu ábyrgdarkenslu hava lagt til síðis milliardaupphædd farnu 4 árini, er nakni veruleikin, at hetta er prógv um, at tey hava lopið frá teirri ábyrgd, sum ein samgonga hevur. Ábyrgdini at byggja út, menna og styrkja samfelagið og møguleikarnar hjá íbúgvunum í samfelagnum.

Klondyke

Heimsmarknaðurin og natúrviðurskiftini hava givið hesi samgongu so góðar møguleika, sum ongin onnur hevur havt í eftirkrígstíðini. Fiskiskapurin hevur verið metstórur, fiskaprísirnir hava verið methøgir, rentan hevur verið metlág, vinnulívið hevur verið metniður-skrivað og blokkurin hevur verið methøgur. Hesi met eru ikki ímorin av samgonguávum. Tey stava frá heimskonjunkturunum, frá natúruni, frá kreppusaneringunum og frá ríkisfelagsskapinum.

Samgongumet

Men samgongan hevur eisini sett met. Met í ómegd. Í hesum gulltíðum hava tey ikki megna at byggja eitt einasta røktarheimspláss, ikki eitt einasta ellisheimspláss. Hvør dagur hevur sína søgu um stovnar, verk, skipanir og øki, sum liggja í andaleypi, tí samgongan ikki vil taka trupulleikar upp, viðgera teir og loysa teir. Sjúkrahúsverkið, skúlaverkið, almannaverkið, serstovnaøki, íbúðarøki, arbeiðsmarknaðurin, umhvørvið – vit kundu hildi á.

Alt hetta hevur ligið á láni, tí samgongan eirindaleyst hevur viljað kroyst eina ósamahangandi forfongiligheitsætlan um loysing niður yvir høvdi á føroyingum. Og í hesi ætlan var neyðugt at fylla landskassan – uttan mun til avleiðingarnar.

Taktikkur brendu jarða

Tá loysingarverkætlanin fall til jarðar og samgongan stóð spillnakin í síni ómegd, var neyðugt at gera okkurt. Tað tykist sum hugburðurin hevur verið, at tá nú onki bar til hjá hesi samgongu, so ráddi um at leggja so nógvar fótonglar sum gjørligt fyri tey, sum skulu taka við eftir valið. Samgongan fór at spæla andstøða, áðrenn valið varð útskrivað. Væl vitandi, at rokningina skulu komandi samgongur gjalda.

Og tí fara vit í hesum valstríði at hoyra tey reypa av øllum teim samtyktu ábótunum. Um suðuroyarferju og lorvíksberghol, um skattalættar og pensjónseina hálva milliard i 4 ár. Blokkniðurskururin bleiv sjálvandi ikki framdur, meðan tey sótu við ræði – tvørturímóti øktu tey um blokkin í teirra tíð.

Met í kynismu

Seinasta metið, sum henda samgonga setti var at lata frá sær eina figgjarlóg við halli. Í størstu gulltíð fólk veit um í hesum landi. Eftir at hava misrøkt landið í nærum fýra ár megnaði høgra- og loysingarsamgongan at venda einum methøgum yvirskoti til undirskot.

Góð sjóneyka krevst fyri at finna kynismu, ið kann javnsetast við hesa.

Dag frá degi verður alt greiðari fyri alt fleiri, at hesi fólk mugu ikki einaferð afturat sleppa at hóreiggja sær í landsins leiðslu.

Og tíbetur forðar stýrisskipanarlógin løgmanni at renna undan møtinum við veljaran longri enn til 30. apríl. Tá verður høvi at fáa eina leiðslu, sum ikki hækkar til 5500 kr í landsskattinum

- at óbrúktur botnfrádráttur verður fluttur ímillum hjún
- at bakkaverja verður gjørd í Sumba
- at Fiskivinnuskúlin sleppur at flyta inn í annan bygning

Talan um hart tiltrongdar og neyðugar batar nevndu umráðir. Og tað segði Sambandsflokkurin ja at fremja.

Vit í Sambandsflokkinum søgdu eitt RUNGANDI NEI at fremja stórsta skaðan í Føroyum seinastu mongu árini: at skerja ríkisveitingina við nærum hálvari milliard. Vit meta, at hesin peningur longu ídag tørvar mangar staðir bæði til viðlíkahald og uppbygging av landi okkara. Um tað er ein skandala at játta einar 40-50 milliónir til barnafrádrátt, botnfrádrátt o.a., so má tað vera størri skandala, at blaka 400 milliónir av ogn føroyinga burtur. Eisini er tað ein skandala, at blaðmaðurin gloymir hesa skandalu. Ella setur viðkomandi spurningar um langtíðarárin av skilaleysu loysingarskerjing.

Neyðugt er at skaðasamgongan verður koyrd frá.

Um tygum vilja meira frælsi og menning í Føroyum, so er at atkvøða fyri Sambandsflokkinum, ið vil fremja skilagóðar broytingar innan ríkisfelagsskap okkara.

Vit vilja tryggja, at fólkaræði aftur sleppur at valda í stórum ríkisrættarligum spurningum.

X fyri Sambandsflokkinum - tá verður tað tryggari fyri teg og tíni.

Skaðasamgongan má burtur og fólkaræði má tryggjast

Marjus Dam
valevni Sambandsfloksins

Onkur loysingarblaðmaður tosar í Dimmu um "stóra skaðan", ið hendi seinastu dagarnar í løgtinginum. Tað undrar at onki verður grett um allar størsta politiska skaðan, ið er framdur í Føroyum í nýggjari tíð, nevniliga at ríkisveitingin varð skerd nærum 400 milliónir krónum. Eigur ein blaðmaður at renna ørindir fyri Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin, kunnu vit spyrja?

Størsti skaði hendi fríggjadagin í løgtinginum. Tá samtykti loysingarsamgongan undir leiðslu av Annfinni Kallsbergi endaliga, at ríkisveitingin skuldi høggast niður við nærum 400 milliónum krónum. Síðan var løgtingi sent heim, val verður útskrivað, og komandi løgting skal so loysa trupuleikarnar av hesi skaðagerð loysingarmanna. Men tað stendur fast, at fíggjarlógin av hesum ávum, í bestu tíð føroyingar vita um, kemur at geva hall komandi ár.

TAÐ VAR SKANDALANNA SKANDALA, ið loysingarflokkarnir framdu. Tí avgerð teirra er í andsøgn við hvat føroyingar ynskja. Men fólkaatkvøðuna, ið teir ikki tordu at hava, fáa vit 30 apríl.

Tað undrar, at blaðmaður í Dimmu nevnir tað at vera eina skandalu

- at barnafrádrátturin verður minkaður til 4000 kr í landsskattinum
- at óbrúktur botnfrádráttur verður fluttur ímillum hjún
- at bakkaverja verður gjørd í Sumba
- at Fiskivinnuskúlin sleppur at flyta inn í annan bygning

Talan um hart tiltrongdar og neyðugar batar nevndu umráðir. Og tað segði Sambandsflokkurin ja at fremja.

Vit í Sambandsflokkinum søgdu eitt RUNGANDI NEI at fremja stórsta skaðan í Føroyum seinastu mongu árini: at skerja ríkisveitingina við nærum hálvari milliard. Vit meta, at hesin peningur longu ídag tørvar mangar staðir bæði til viðlíkahald og uppbygging av landi okkara. Um tað er ein skandala at játta einar 40-50 milliónir til barnafrádrátt, botnfrádrátt o.a., so má tað vera størri skandala, at blaka 400 milliónir av ogn føroyinga burtur. Eisini er tað ein skandala, at blaðmaðurin gloymir hesa skandalu. Ella setur viðkomandi spurningar um langtíðarárin av skilaleysu loysingarskerjing.

Neyðugt er at skaðasamgongan verður koyrd frá.

Um tygum vilja meira frælsi og menning í Føroyum, so er at atkvøða fyri Sambandsflokkinum, ið vil fremja skilagóðar broytingar innan ríkisfelagsskap okkara.

Vit vilja tryggja, at fólkaræði aftur sleppur at valda í stórum ríkisrættarligum spurningum.

X fyri Sambandsflokkinum - tá verður tað tryggari fyri teg og tíni.

Áheitan á leiðsluna í Sambandsflokkinum!

Jørmund Vágadal

Eitt uppskot frá bæði samgongu og annstøðu átti at verið viðtikið!

Fyri 2 árum síðan løgðu tit saman við Javnaðarflokkinum uppskot fram á ting um skattalætta, eitt uppskot, sum meira ella minni er meinlíkt uppskotinum, sum Fólkaflokurin nú leggur fram uppá einar 80 mill kr. Fólkaflokkurin bar seg undan at atkvøða fyri tykkara uppskotið fyri 2 árum síðani við tí grundgeving, at Kartin Hansen fór at koma við einum líknandi uppskotið, og sum Óli Breckmann so beinraki segði tá, so var hann í samgongu við Kartini og kundi tí ikki atkvøða fyri tykkara uppskoti.

Hvat er hent og ikki síðan tá, veit eg ikki, tí Óli Breckmann er framvegis í samgongu við Kartini, men leggur nú, 2 ár seinni, framm tykkara uppskot um skattalætta í meira ella minni óbroyttum líki.

Nú krúpa tit uttanum!

Tað sum Óli Breckmann bar seg undan við fyri 2 árum síðani eru tit og Javnaðarflokkurin nú farnir at gera. Nú skulu umstøðurnar og fyritreytirnar bráddliga verða so nógv broyttar síðan seinast.

Men mínir góðu vinir í sambandsflokkinum, hetta heldur ikki yvir fyri manninum á gøtuni. Hetta eru undanførðslur, sum bert sáða yva um tit veruliga ætlaðu at lætta um økta skattatrýstið, sum Kartin hevur lagt oman yvir okkum seinastu 4 árini.

Bæði skattalætta og niðurskurð í blokkinum!

Um Óli Breckmann atkvøddi fyri tykkara uppskoti fyri 2 árum síðan og skattalættin soleiðis var blivin ein veruleiki, so høvðu tit og Javnaðarflokkurin, aftaná, at skattalættin var vorðin veruleikin, onga sum helst ávirkan á tann niðurskurð, sum samgongan nú hevur gjørt í blokkinum úr Danmørk. Vit høvðu sostatt bæði havt skattalætta og niðurskurð í blokkinum.

Nú er niðurskurðurin í blokkinum ein veruleiki, men ongin skattalætti. Men tit hava nú fingið ein nýggjan møguleika til at vísa í verki, at tit verunliga meintu tað fyri 2 árum síðani at geva fólkinum ein skattalætta. Og vælsignaði, ikki koma við býttisligum undanførslum um broyttar fyritreytir og annað svans, vit onnur duga at rokna og síggja raðfestingarnar, uttan at tit greiða okkum frá tí. Ikki haldi, at tit eru vorðin yvirmenniskjaligir roknimeistarar, bert tí at tit tilfeldivís eru komin á ting. Ongin skal billa okkum inn, at allar heimsins vanlukkur nú hanga uppí einum skattalætta uppá 80 mill. kr. eftir at tit hava játtað pening í milliard klassanum, - nú skulu hesar neyðars 80 milliónirnar verða alt avgerandi fyri, um vit fara á húsagang ella ikki. Ikki ein sambandsveljari ella javnaðarveljari ella fólkafloksveljari trýr tykkum. Hetta eru býttar undanførslur fyri at krúpa uttanum at gjøgnumføra skattalættan, sum tit sjálvir skutu upp fyri 2 árum síðani.

Gerið nýggju óformellu samgonguna longu nú!

Takið hond saman við Fólkaflokkinum og gevi fólkinum tann skattalætta, tey so inniliga hava uppiborðið og byrji soleiðis eitt samstarv longu nú saman við Fólkaflokkinum, eitt samstarv, sum røkkur út um valdagin 30 apríl komandi. Tit kundu, sum fyrstu uppgávu í nýggju samgonguni, givið Óla Breckmann uppgávuna at finna tær 80 milliónirnar, sum skattalættin kostar. Tað kann, eftir tí, sum Óli sjálvur førir framm, ikki verða nakað stórt problem hjá honum at loysa.